# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## »Sjokulátavirkið« í miðbýnum




*Peturbjørg Poulsen eigur og rekur "Sjokolátavirkið" í miðbýnum í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hósdagin 27. oktober læt ein nýggjur handil upp í miðbýnum í Havn. Talan er um "Sjokolátavirkið" v. Peturbjørg Poulsen**

HANDIL

»Sjokolátavirkið« er ein handil við m.a. hondgjørdari konfekt og bommum, sum verða seld eftir vekt. Sjokulátan verður virkað til í smáum nøgdum í handlinum, soleiðis at hon er so nýggj og frísk sum gjørligt.

Eisini eru ymiskir gávultir at fáa í handlinum sum t.d. krukkur, skálir og kurvar við konfekt, sigur Peturbjørg Poulsen.

Sjokulátavirkið er í N. Finsensgøtu, millum Radiohandilin og Hjalmar Jacobsens bókahandil, har sum Heimavirkið var.





## Listaframsýning í Runavík

Í sambandi við Mentanarvikuna í Runavík heldur listaframsýningin hjá Jóannesi S. Hansen í býráðssalinum fram um vikuskiftið.

Á framsýningini eru 31 akrylmálningar, bæði abstraktir og hálv naturalistiskir.

Opið er leygardagin og sunnudagin millum kl. 15 og 19.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

LANGUR LEYGARDAGUR 28. okt. 2006
RESTÚTSØLA
Fyll Kallkynsposan
fyri kr. 500,-
Opið er frá kl. 09.00 – 16.00
Kallkyn
VÁGSBOTNUR • TEL. 316 206